# Próvhandan á Fiskivinnu-skúlanum

Mikudagin 27. juni var próvhandan á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, har 12 næmingar, allar gentur, fingu HIF-prógv (prógv fyri hægri útbúgving innan fiskivinnu), og 15 næmingar fingu SIF-prógv (prógv fyri støðisárið innan fiskivinnu). Eisini fekk ein lærlingur, sum hevur verið í læru hjá Fiskaaling við Áir, prógv fyri yrkisútbúgving innan aling. Í sambandi við próvhandanina helt Heidi Petersen, løgtingskvinna, røðu fyri næmingunum.



*Hægri útbúgving innan fiskivinnu, fremra rað f.v.: Annfríða Helgadóttir, Mary Tórhalsdóttir, Maibritt Festirstein, Joan J. Berthelsen, Anna Maria Petersen, Elin Bærentsen og Joan Berg Johansen. Aftara rað f.v.: Finngerð Jensen, Tórunn Jónolvsdóttir, Annelisa Justinussen, Gunrið Christiansen, Elin Heinesen og Johnny Ljósá Rasmussen, sum fekk prógv fyri yrkisútbúgving innan aling*

*Mynd: Snæbjørn í Dali*



*Støðisútbúgving innan fiskivinnu, f.v.: Jóna M. Davidsen, Ronald Chow (AFS-næmingur), Andras Mikkelsen, Theodor T. Thomassen, Per Martin Gregersen, Magnus Frederik Joensen, Hallur Johannesen, John Martin Andreasen, Harry Jacobsen, Tummas Olsen, Bjartur Tórhalsson og Elisabeth Strømsten. Símun Pauli Ejdesgaard og Rósa Egholm vanta á myndini*

*Mynd: Snæbjørn í Dali*

# Bert tveir eftir á lívi

Í fjør vóru 60 ár liðin síðan skonnartin Borgin fór sín fyrsta túr til Grønlands við eini manning upp á 32. Okkum kunnugt eru bert tveir av teimum eftir á lívi. Borgin sakk í Grønlandi í 1954

Av teimum 32 monnunum sum mynstraðu við Borgini úr Vági í 1946, er okkum kunnugt bert tveir eftir á lívi, tað eru Jacob Martin Jacobsen á Viðareiði og Eli Petersen í Havn. Borgin sakk inni á einum grønlendskum firði í 1954, eftir at eldur var komin í hana. Thorvald Hjelm í Vági var skipari á Borgini.

Mannningin sum mynstraði við Borgini í 1946 var hendan: Thorvald Hjelm, Vágur, skipari, Oscar Hjelm, Vágur, bestimaður, Per Kirke, Kirkja, bestimaður, Fritleif Jacobsen, Vágur, motorpassari, Eskild Vinther, Vágur, smyrjari, Mouritz Johannessen, Vestmanna, kokkur, Ejler Jacobsen, Vágur, fiskimaður, Gutte A. Hansen, Vestmanna, fiskimaður, Hans Olsen, Vestmanna, fiskimaður, Johs. Nysted, Norðskáli, fiskimaður, Ásbjørn Kærbo (Sumba), Skopun, fiskimaður, Eivin Jacobsen, Skáli, fiskimaður, Hjartvard Kærbæk, Sumba, fiskimaður, Jacob M. Jacobsen, Viðareiði, fiskimaður, Elmar Joensen, Vágur, fiskimaður, Jacob Petersen, Vágur, fiskimaður, Thorvald Joensen, Vágur, fiskimaður, Thomas Juel Magnussen, Vágur, fiskimaður, Magnus Magnussen, Vágur, fiskimaður, Elibert Kirke, Vágur, fiskimaður,

Jarmund Vest-Joensen, Vágur, fiskimaður, Jens Dam, Sumba, fiskimaður, Volfang Andreasen, Norðskáli, fiskimaður, Hentze Joensen, Sandvík, fiskimaður, Daniel J. Hjelm, Vágur, fiskimaður, Sunleif Hjelm, Vágur, fiskimaður, Eli Petersen, Kvívík, fiskimaður, Ole Jacob Nielsen, Vestmanna, fiskimaður, David Davidsen, Válurin, fiskimaður, Rudolf Johannessen, Vestmanna, fiskimaður, Christian Joensen, Vágur, matrósur, og Joen Martin Joensen, Oyndarfjørður, stýrimaður.

Túrurin var í fýra mánaðir, frá mai til september. Eli Petersen sigur, at teir fiskaðu 1.480 skippund, og manningarparturin var 4.300 krónur, sum var ein góð inntøka tá í tíðini.

*Kelda: Eli Petersen*



*Borgin á Vágsfirði. Skonnartin sakk inni á einum grønlendskum firði í 1954, eftir at eldur var komin í hana*





*Eli Petersen í Havn (ættaður úr Kvívík) og Jacob Martin Jacobsen á Viðareiði(ættaður úr Kirkju á Fugloy og vaks upp á Viðareiði) eru okkum kunnugt teir einastu, sum eru eftir á lívi av teimum, sum mynstraðu við Borgini í 1946*